# Svensk góðska við fangandi tónum


Mynd: Rógvi Laksáfoss

**Loney, Dear borgaði fyri einari ótrúliga góðari framførslu, har heildin gekk upp í eina hægri eind**

UMMÆLI
*Petur Háberg*
*petur@sosialurin*

Einki er so rotið, sum at hava stórar vónir til eitthvørt, sum síðani skuffar. Hinvegin er tað heilt ótrúliga gott, at verða tikin av bóli av nøkrum, sum tú einki væntar av. Soleiðis var tað við Loney, Dear, ið var á skránni eftir Eivör leygarkvøldið.

### Sólskinstónleikur

Leygarkvøldið var nógv fólk á G! Hini bæði undanfarnu kvøldini hevur Spæliplássið ikki verið fult fyrr enn klokkan nærkast midnátt. Men tá ið Loney, Dear trein á pall um sjey-tíðina, var so at siga fult. Flestu fólkini sótu niðri, meðan sólin hitaði bakið.

Og sjálvt um nøkur heilt fá stillaðu seg upp, eitt sindur inn í framførsluna, vóru vit fleiri, ið nutu bleytu tónarnir í góðveðrinum.

### Tónleikurin talaði fyri seg

Bólkurin spælir svenskan indiepop. Vakrir og fangandi tónar, kryddað við annarleðis elementum. Sangirnir eru tílíkir, ið tú murrar aftaná.

Tónleikurin hjá teimum leiðir tankarnir eitt sindur til Death Cab For Cutie, The Postal Service og eisini Peter, Björn and John.

Sangarin og samstundis heilin aftan fyri bólkin, Emil Svanängen, gjørdi ikki nógv um seg. Hann prátaði eitt sindur inn í millum sangirnar, men av tí at tað var á svenskum og kanska í so skjótt, var tað til tíðir eitt sindur trupult at fylgja við. Hetta fekk hann eisini at vita av trummuspælaranum móti endanum á framførsluni.

Men hetta bilti ikki, tí tónleikurin talaði fyri seg. Torført er at seta orð á, júst hvat gjørdi framførsluna einastandandi. Mangan ber til at peika á okkurt ávíst. Trummurnar sótu væl, bassurin legði ein góðan botn ella gittarin hevði eitt gott ljóð.

Men hjá Loney, Dear var tað einki ljóðføri, ið skaraði framúr, men heldur var tað heildin, ið ljóðaði væl. Ljóðmyndin var ikki ov full ella ov tunn. Øll kendu sín leiklut. Og oftani er tað tá, at tingini ganga upp í eina hægri eind.

Besta framførslan á G! í ár, eftir mínum tykki.

# Eygnaopnari á Spæliplássinum: Metronomy

**Sum fleiri onnur á Spæliplássinum, so fall eg líðandi, men trygt, fyri Metronomy. Teir - tríggir bretar í svørtum, hvør við einum lítlum lampuljósi á bringuni(!), hvør við sínum ljómborði, spældu elektroniskan tónleik.**

G! FESTIVAL 2007
*Johan Jacobsen*
*Johan@sosialurin.fo*


Mynd: Sunva E. Lassen

Einfaldar robottiskar rytmur við einfaldum gittarriffum. Onkuntíð var gittari ella so var bassur frammi. Alt púrasta elektroniskt, eisini teir tríggir svørtu robottarnir. Framførslan var ikki bara ein tónleikaframførsla, hon var nakað meiri enn tað.

Tónleikurin minti meg um okkurt týskt elektroniskt, og Kraftwerk er tað einasta eg kenni nakað til. Bert eitt av løgunum vóru orð løgd til, og hesin eini sangurin breyt eitt sindur frá elektronika-sjangruni.

Framførslan, ið byrjaði kl. 20.00, fór fram í bjørtum, blendandi sólskini, so lampuljósini hjá teimum trimum komu ikki til sín rætt í sólskininum. Tey virkaðu løgin og fremmendagerandi, hetta er eisini eyðkennir í hesum slagnum av tónleiki.

Framførslan var stutt, ikki nógv meiri enn 30 minuttir. Og tey uml. seks løgini vóru avgjørt eygnaopnarar fyri mítt viðkomandi og allarhelst fyri fleiri afturat. Ein ungur eysturingur aftanfyri meg ljóðaði eisini til at hava fingið eyguni upp fyri onkrum nýggjum og hugtakandi, hann hevði nokk eina líknandi uppliving sum eg:

- Hatta var ræðuliga cool, var hatta!



Mynd: Sunva E. Lassen



Mynd: Rógvi Laksáfoss